# Høgni er høvuðsnavnið

**Ársins fløga 2005, Morning Dew hjá Høgna Lisberg, hevur vakt ans í Íslandi seinastu vikurnar. Hann er at hoyra í íslendskum útvarpi nógvar ferðir hvønn dag. Í Reykjavík verður hann mettur sum høvuðsnavnið á AME Reykjavík, sigur føroyavinurin Jens Guð**



*Morning Dew hjá Høgna Lisberg vann planetina fyri bestu fløgu, nú leggur hon Ísland fyri sínar føtur*

*Mynd: Símun Jóanesarson*

AME REYKJAVÍK

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Leygardagin fara seks føroyskir og ein íslendskur bólkur á pallin í kendasta spælistaðnum í Reykjavík NASA. Hóast bólkarnir: Marius, Makrel, Lena, Gestir og Deja Vu allir eru stór nøvn í Føroyum, so er tað Høgni Lisberg, ið er høvuðsnavnið í Reykjavík. Hetta sigur heimildarmaður okkara í Íslandi Jens Guð.

Jens Guð hevur í útvarpi og í bløðum vist íslendingum á føroyskan tónleik í nógv ár. Fyrstu árini, var áhugin ikki stórur, sigur Jens Guð. Men síðan Ormurin Langi hjá Týr legði Ísland fyri sínar føtur á vári í 2002, hevur talan verið um sanna eina føroyska aldu, ið enn skolar yvir Ísland nú skjótt á fimta ári.

### Høgni er nýggjasta hittið

Nýggjasta føroyska navnið, ið veruliga ger vart við seg í Íslandi er Høgni Lisberg. Lagið Morning Dew seinastu vikurnar verið í sokallaðari A-rotatión á stóru útvarpsstøðini Rás 2. Hetta merkir, at lagið verður spælt 4-5 ferðir um dagin á støðini, og eisini aðrar útvarpsstøðir geva tí ans. Eitt nú alternativa rokk og tungmálms útvarpsstøðin X-fm.

Hesa vikuna er fløgan Morning Dew, "Fløgan hesa vikuna" hjá Rás 2. Hetta merkir, at øll løgini verða spæld hesa vikuna. Fløgan verður ummæld av tónleikaserfrøðingum hjá Rás 2. Hon er somuleiðis vinningur í spurnarkappingum, ið snúgva seg um júst Høgna Lisberg. Áhugin fyri Høga er alsamt vaksandi, og tí er hann eisini boðin at syngja í bæði almennu sjónvarpsrásini Sjónvarpið og í óheftu sjónvarpsrásini Skjár 1, meðan hann er í Íslandi. Hann spælir somuleiðis konsert á Rás 2.

### Gott ískoyti

Íslendski marknaðurin er ikki risa stórur, men fleiri føroyskir bólkar hava selt rættiliga fitt av fløgum har. Jens Guð nevnir størstu føroysku stjørnuna Eivør Pálsdóttir, ið hevur selt umleið 10.000 eintøk av hvørjari útgávu í Íslandi, meðan Týr seldi umleið 4.000 eintøk av How Far To Asgaard.

Hetta er eitt gott íkast hjá einum føroyskum bólki, tí í Føroyum er tað bert hendinga fløga, ið selur yvir 3000 eintøk.

### Nógv føroyskt til oyruni

Men tað er ikki bert Høgni Lisberg, ið er at hoyra í íslendsku miðlunum. Can't Erase It hjá Lenu, er somuleiðis á A-rotatión á Rás 2, meðan Confused hjá Deja Vu og Filthy Tongue hjá Makrel eru í B-rotatión og verða spæld 2-3 um døgnið á støðini.

Filthy Tongue er somuleiðis nógv at hoyra á X-fm. Makrel var upprunaliga ein av bólkunum, ið settu gongd á føroysku alduna. Makrel var eitt kent navn í Íslandi, áðrenn Føroyar tók bólkin til sín. Hetta var um sama mundið, sum Týr gav Ormin Langa út, tá luttók Makrel í íslendsku tónleikakappingini Músíktilraunir. Teir gjørdust nummar trý í kappingini og gittarleikarin Rasmus Rasmussen varð valdur besti gittarleikari í kappingini. Vinningurin var nakrir dagar í upptøkuhøli, ið vórðu brúktir til at spæla inn og ljóðblanda fyrstu fløguna Makrel Stinkar. Henda fløga varð spæld rættiliga fitt í íslendskum útvarpi. Tí eru tað eisini sambært Jens Guð, fleiri, ið gleða seg til at síggja Makrel aftur á íslendskum palli.

### Guð fær egna sending

Jens Guð hevur sjálvur merkt, at aldan er farin at skola eitt sindur ógvisligari, nú AME Reykjavík er komið í lag. Útvarpsrásin Útvarp Saga, hevur sett tveir tímar um vikuna á sendiskránna, har Jens Guð sleppur fer at spæla føroyskan tónleik fyri íslendingum. Hann sigur seg gleða seg óført til hetta, ið byrjar um fáar vikur og sigur »Ímynda tær, eg sleppi at spæla tveir heilar tímar av føroyskum tónleiki um vikuna!«. At hesin Føroya vinur hevur eitt hjarta, ið bukar fyri okkara tónleiki, er eyðsæð.




BROYTTAR TELEFON- OG AVGREIÐSLUTÍÐIR

Frá 18. apríl 2006 verður telefonavgreiðslan á Akstovuni broytt.

Til ber at ringja gerandisdagar millum kl. 10.00 og kl. 14.00 á telefon 350400.

Fyri at lætta um trýstið á telefonavgreiðsluna, verður heitt á viðskiftafólk um, í mest møguligan mun, at nýta teldupost á adressuni: **akstovan@akstovan.fo** ella telefax 350401.

Samstundis verður avgreiðslutíðin á skrivstovuni fríggjadag broytt til kl. 08.30 til kl. 14.00.

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206
FO-110 Tórshavn | Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01
www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

REPROZ


# Miðvísa arbeiðið sæst aftur

**Í meira enn tíggju ár hevur Norðurlandahúsið og serliga Fróði Vestergaard arbeitt fyri at fáa føroyskan tónleik út um landoddarnar, nú byrjar úrslitið av hesum arbeiði veruliga at síggjast aftur**



*Prix vinnararnir Clickhaze vóru í 2001 fyrsti føroyski bólkurin á Nibe*

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hetta vikuskiftið verður Atlantic Music Event hildið í Reykjavík, seks føroyskir bólkar fara á pallin í best umtókta spælistaðnum í Reykjavík, Nasa, og longu nú eru íslendskir miðlar á tremur við føroyskum tónleiki. Hetta er nýggjasta sólskinssøgan um føroyskan tónleik í útlandinum.

Men eisini søgan um Høgna Lisberg, The Dreams og 200, ið spæla á Spot Festivalinum. Petsi Tvørfoss og Messell í spæla á Nibe Festivalinum. Eivør Pálsdóttir á Jelling Festivalinum, vísa høga støðið á føroyskum tónleiki. Men hesar søgur eru somuleiðis úrslit av miðvísum arbeiði fyri at fáa føroyskan tónleik út um landoddarnar.

Her hevur eingin einstaklingur, felagsskapur ella tiltak havt eins stóran týdning, sum Prix Føroyar, Norðurlandahúsið, og serliga samskiparin Fróði Vestergaard. Her er talan um miðvíst arbeiði í meira enn eitt ártíggjund, ið nú veruliga byrjar at geva úrslit.

Serliga Jelling Festivalurin og Nibe Festivalurin hava tikið føroyskan tónleik til sín. Hetta eftir at festivalarnir hava vitjað í sambandi við Prix Føroyar. Nibe bjóðaði í 2001 og 2002 Prix vinnaranum Clickhaze á pallin. Árið eftir var tað Prix vinnarin 2003 Gestir, ið luttók, eins og Brandur Enni, ið hevði spælt á sýnisgluggakonsert fyri útlendsku gestunum í sambandi við Prix Føroyar. Síðan hava Guðrun Sólja Jacobsen, Teitur, Eivør og Høgni Lisberg spælt á festivalinum.

Jelling Festivalurin hevur somu árini havt Týr, Deja Vu, Brand Enni, Teitur, Guðrun og Eivør á palli. Nógv av nøvnunum eru vald út á tiltøkum hjá Norðurlandahúsinum og Føroya Undirhaldstónleikarafelag, og onnur eru óbeinleiðis avleiðingar av tí áhuganum, ið festivalarnir hava fingið fyri føroyskum tónleiki á sínum vitjanum í Føroyum.

Eisini Spot festivalurin hevur vitja í sambandi við Prix Føroyar nakrar ferðir. Spot bjóðaði í 1999 MC-Hár at luttaka, eftir at bólkurin gjørdist nummar trý í Prix Føroyar finaluni, eisini Teitur luttók hetta árið og hevur vitja aftur fleiri ferðir síðan. Eitt nú Eivør og Lena hava somuleiðis spælt á Spot, ið er ein ídnaðarfestivalur, har fleiri hundrað fólk úr tónleikaídnaðinum savnast fyri at uppliva, tað besta innan nýggjan tónleik. Í ár eru Norðurlandahúsið og Spot festivalurin farin í beinleiðis samstarv, ið higartil hevur víst seg við, at trý føroysk nøvn eru avdúkaði á festivalinum.